# Nýggja ferðslulógin kemur í gildi í dag

*Hægri bøtur, lægri promilumark, forboð móti fartelefon, broytt hámarksferð, treyta frádøming av koyrikorti. Hetta eru bert nakrar av broytingunum í ferðslulógini, sum koma í gildi í dag. Ferðslutrygd minnir á broytingarnar:*




Í dag koma nýggju broytingarnar í ferðslulógini í gildi. Í hesum sambandi hevur Ferðslutrygd gjørt yvirlit yvir nakrar av teimum týdningarmestu broytingunum:

**Bøturnar hækka**
Í veruleikanum verða bøturnar nú eins høgar í Føroyum og í Danmark. Har føroyingar frammanundan vóru vanir við bøtur fyri serliga brot á ferðmørkini uppá 300 til 400 krónur, fara bøturnar nú í einstøkum førum at tátta í 2000 krónur. Allar aðrar bøtur hækka.

**Promillumarkið fer niður**
Markið fyri promillukoyring verður nú 0.5, og markið fyri rúsdrekkakoyring 0,8.

Løgreglan óttast fyri, at mong fara at falla fyri promillumarkinum, tí mong hava verið tikin seinastu mánaðirnar og árini við eini promillu millum 0.5 og 0.8 — hetta merkir, at hesi nú falla fyri promillumarkinum.

**Handhildin fartelefon bannað í bili**
Løgreglan fer at byrja við at geva ávaringar, verða fólk tikin fyri at tosa í handhildnari fartelefon, meðan tey koyra bil. Orsøkin er, at útgerð til sokallaðu »handsfree"« skipanina í mongum førum ikki er á goymslu í Føroyum. Tískil verður talan um eitt heilt stutt tillagingarskeið.

**Trygdarbeltið nýtast**
Nú skal trygdarbeltið nýtast. Førari fær 400 krónur í bót fyri ikki at nýta trygdarbelti, umframt at hann kann fáa somu bót fyri hvønn einstakan í bilinum undir 15 ár, sum ikki situr í trygdarbelti.

**Hámarksferð og ferðmørk eru broytt**
Akfør yvir 3.500 kg mugu ongantíð koyra skjótari enn 70 km/t í óbygdum og ongantíð meira enn 50 km/t í fjølbygdum øki, hóast ein hægri staðbundin hámarksferð er ásett.

Øll, sum koyra akfør yvir 3.500 kg, eiga serliga at leggja til merkis ferðmørkini — tí fyri hesi er galdandi, at koyra tey meira enn 20 km/t skjótari enn tað loyvda, so rýkur koyrikortið. Fyrr var talan um 30 km/t.

**Hald kann leggjast á akfarið**
Eitt akfar kann nú inndragast, um tað verður mett neyðugt fyri at forða fyri fleiri brotum, um atkfarið er nýtt til grov ella endurtikin brot á ferðslulógina.

**Nærljós skulu nýtast**
Flestu nýggju bilar hava automatisk koyriljós, men langtfrá allir. Eftir 1. juli skulu allir bilar brúka koyriljós. Til tey gloymsku er at siga, at um ein ikki minnist til at tendra ljósini, so ber til at fáa ísett sjálvtendrara í flestu bilar fyri yvirkomiliga upphædd. Spyrji á bilsøluni.

**Treytað frádøming**
Nakað heilt nýtt í ferðslulógini er treytað frádøming av koyrikortinum í sambandi við fyrstuferðarbrot undir serliga linnandi umstøðum.

Hetta merkir í stuttum, at lógbrótarin fær bót og ein treytaðan dóm í ávísa tíð. Brýtur hann lógina aftur í hesum tíðarskeiði í so stóran mun, at nýggja brotið minst gevur sama dóm, so fellur hamarin harðliga, tí endurtøkuavleiðingarnar eru, at bæði upprunaligi og nýggi tilburðurin verða lagdir sum grund undir treytaleysari frádøming. Treytað frádøming verður bert brúkt undir heilt serliga linnandi umstøðum, og tað verður upp til dómsvaldið at leggja støði í tílíkum málum.

**Børn í bili**
Øll ferðandi í bilinum skulu sita í trygdarbelti. Men ásetingin í nýggju lógini sigur kortini, at um setur við trygdarbelti er tøkt aftan, so skal trygdarbelti nýtast.

Øll børn skulu hereftir sita í trygdarbelti, í barnastóli ella líknandi útgerð, um tey eru undir 7 ár. Førarin hevur revsiábyrgd av, at øll undir 15 ár sita í trygdarbelti. Ferðslutrygd vegleiðir um útgerð til børn undir 7 ár.




## Avreiða ræðisrættin

*Arbeiðsgevarafelagið heldur tað vera rætt, at hildið verður fast við verandi mark, har útlendski ognarparturin er avmarkaður til 33%, verður m.a. sagt í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum*

Gongdin innan føroysku alivinnuna hevur seinastu tíðina fingið fleiri innan vinnuna at ávara ímóti, at føroyingar avreiða ræðisrættin innan fiski- og alivinnuna. Á nevndarfundi hósdagin 15. juni viðgjørdi Føroya Arbeiðsgevarafelag tí henda spurningin, sigur Vinnuhúsið.

Felagið hevur ta støðu, at avgerandi munur er á loyvistengdum vinnum, sum fiski og alivinnan, og øðrum vinnugreinum, har óavmarkað atgongd er at taka upp vinnuvirksemi. Felagið heldur tað tí vera rætt, at hildið verður fast við verandi mark, har útlendski ognarparturin er avmarkaður til 33%.

Samstundis er Arbeiðsgevarafelagið av teirri áskoðan, at: lógargrundarlagið um neyðugt má broytast, so hesar reglur standa púra greiðar. Tjakið seinastu tíðina bendir á, at t.d. alilógin ikki lýkur hesi krøv.

At neyðugt er, at lógargrundalagið verður tillagað, so fullkomuliga gjøgnumskygni er í øllum eigaraviðurskiftum innan allar loyvistengdar vinnur.

At tað almenna á henda hátt skal tryggja, at fylgjast kann við í, um reglurnar verða hildnar.

Og um reglurnar ikki verða hildnar, skulu lógarásettu avleiðingarnar fylgjast — og at loyvir verða tikin aftur, verður sagt frá Vinnuhúsinum.



# Samfelagskjak á netinum

*Væl vitjaða kjakforumið hjá Faroenet, sum gjørdist óvirkið fyriahálvumøðrum ári síðan, er nú komið fram aftur á netið. Málið er at skapa eitt forum har seriøst kjak trívist.*

RÚNAR REISTRUP




Tað gjørdist væl dámt og varð nógv vitjað. Og so slóknaði tað.

Kjakforumið hjá Faroenet fekk ein bráðan enda, tá fyritøkan knappliga skifti servara, og ikki hevði áhuga í at hava kjakforumið liggjandi á nýggja servaranum.

Men eftir at nógv fólk hava heitt á Faroenet um at taka kjakforumið uppaftur, er tað nú aftur at finna á netinum.

Fyribils er tað gamla skipanin, sum er komin aftur, men arbeitt verður við at gera eina nýggja skipan til kjakforumið.

**Halda ein standard**
Málið hjá Faroenet er at fáa nógvar vitjanir og eitt gott kjak í gongd. Og hesi bæði málini ganga so at siga hond í hond, sambært Faroenet.

- Alt tvætl og fjas verður slettað, og sama er galdandi fyri persónliga útspilling. Tað er neyðugt at hava ein ávísan sensur, tí megna vit ikki at halda ein rímiligan standard, so er vandi fyri, at kjakið druknar í óseriøsum tvætli, og tá er tað einki vert, sigur Jens Pauli Rasmussen frá Faroenet og samanber tað við ein náttklubba.

- Loyvir tú einum vánaligum klientelli inn, so missir tú per definitión teir góðu kundarnar. So skulu vit hava nógvar vitjanir, má kjakið vera gott.

**Dulnevnd innlegg**
Á Faroenet hava tey valt at loyva dulnevndum innleggum í kjakið. Men fólk skulu gera sær greitt, at um eitt innlegg er undirskrivað við dulnevni, so ber ikki til at leggja eftir navngivnum persónum.

- Tey dulnevndu innleggini fáa styttri teymar enn tey navnnevndu. Tá fólk skriva egið navn undir, so halda vit, at vit kunnu loyva okkum at hava tey standandi - eisini um tey eru eitt sindur kontroversiell. Men har eru sjálvsagt eisini mørk fyri, hvat tey navnnevndu kunnu loyva sær, sigur Jens Pauli Rasmussen.

Kjakið á Faroenet Forum er „live". Við øðrum orðum fer eitt innlegg beint inn á kjaksíðuna, tá tað verður sent frá høvundanum. Tað skal ikki til góðkenningar fyrst.

- Vit hava valt at gera tað til eitt beinleiðis kjak, fyri at fáa tað meira livandi. Hini síggja beinanvegin hvat onkur annar hevur skrivað, og kunnu tískil eisini svara umgangandi. Men vit eru sjálvir inni á foruminum frá morgni til myrkurs so at siga, og tí verða innlegg skjótt sensorerað, um tey ikki líka krøvini fyri seriøsiteti og virðing fyri persónum.

**Varð væl vitjað**
Tá kjakið hjá Faroenet gavst at virka á sinni, hevði tað eini 1.000 sokallað „hit" um samdøgrið. Her skal takast við í metingina, at fyri hálvumøðrum ári síðan høvdu væl færri føroyingar atgongd til internetið, og tískil var talan um eina rættiliga væl vitjaða tænastu.

Spurdur um hví kjakið gjørdist so væl umtókt, sigur Jens Pauli:

- Orsøkin man helst vera, at kjakevnini eru so mong, at tað slepst næstan ikki undan, at okkurt er fyri einhvønn áhuga. Og tá kjakast verður um okkurt, ið viðkemur einum, verður ein mestsum drigin til at vitja staðið aftur og hyggja, hvat er komið burturúr - hvat nú er vorðið sagt, og um onkur hevur svarað upp á tað innleggið, sum ein sjálvur hevur skrivað.

Hann metir, at tey vitjandi eru í øllum aldursbólkum - eisini teimum yngru, men at innleggini helst ikki verða skrivað av fólki, ið eru yngri enn18 ára aldur.

**Tingmenn fylgja við**
Men hvat hjálpir tað so at sita og kjakast á internetinum? Ikki einki, sambært Jens Paula Rasmussen, ið nevnir dømi um tingmenn, sum hvønn dag vóru inni á kjakforuminum - ikki fyri at kjakast, men fyri at fylgja við í hvat fólk halda um tey politisku málini, ið eru frammi.

- Ein av teimum áheitanunum, ið vit hava fingið um at lata kjakforumið uppaftur, kom frá einum tingmanni. Tað helt eg vera nokkso stuttligt, sigur Jens Pauli Rasmussen frá Faroenet.

Kjakforumið hjá liggur á adressuni www.faroenet.fo

